ÍF

Teir vita hvat tað snýr seg um

Á ÍF liðnum, sum fer at stríðast fyri at sleppa undan at missa plássið í Formula deildini beinanvegin, eru nógvir spælarar, sum áður hava roynt seg í fremstu røð

Eftir stuttan steðg í næstbestu deildini er ÍF aftur í fremstu røð. Takið verður at sleppa undan tveimum teimum niðastu plássunum og harvið niðurflyting.

Nógvir spælarar vita, hvat tað snýr seg um. Ein stórur partur av teimum, sum eru á manningarlistanum hesa ferð, hava verið við til bæði at flyta upp og at flyta niður – onkrir teirra fleiri ferðir.

Sum so nógva aðra staðni hava fuglfirðingar mett tað vera neyðugt við styrki aðra staðni frá. Tað er loyvt at hava fýra útlendingar á vøllinum í senn, og fimm spælarar kappast um hesi plássini. Mest upplagdi á vøllinum av teimum fýra er málverjin Andras Gango, sum hevur verið í Fuglafirði í ?? ár.

ÍF hevur tríggjar útlendingar á miðvøllinum. Tann við flestu roynd-um í føroyskum fótbólti er Aleksander Jovevic, sum umframt í Fuglafirði hevur spælt á Skála og í Runavík. Vónirnar eru stórar um, at Sasa Jovanovic, sum áður hevur verið skarprættari hjá TB?? skal syrgja fyri ÍF málum í ár.

Bartal Eliasen er framvegis millum veteranarnar. Ein annar veteranur, sum ikki hevur verið við tvey tey seinastu árini, men sum nú stríðist við at vinna pláss í verjuni er Torstein Joensen. Jonn Thomsen hevur seinastu árini verið nógv skaðaplágaður, men nú er hann aftur í verjuni, har aðrir við nógvum royndum – hóast teir framvegis eru ungir spælarar - eru Áki Petersen, Fritleif í Lambanum og Knút Vesturtún, sum áður hevur spælt við EB/Streymi. Ungir spælarar, sum ætla sær pláss í verjuni, eru Jan Ellingsgaard og Uni R. Petersen.

Útlendingarnir á miðvøllinum fáa kapping eitt nú frá stríðsmanninum Høgna Madsen, sum eftir at hava verið í Gøtu og Klaksvík í fleiri ár, nú er aftur í Fuglafirði. Debus Danielsen er komin úr Runavík, Frank Poulsen hevur verið uppií seinastu árini, og so er tað Dánjal á Lakjuni, sum seinna partin av kappingarárinum í fjør royndi seg í Leirvík, og sum nú skal syrgja fyri, at tað framvegis eru Lakjumenn á ÍF liðnum.

Atli Peteren og toftamaðurin Dánjal Pauli Højgaard eru møguleikar í álopinum.

Ætlanin var, at Jón Simonsen skuldi halda fram sum venjari, og hann var við í fyrstu fyrireikingunum. Av persónligum ávum noyddist hann at gevast. Síðani hevur Abraham Løkin havt ábyrgdina, og tað fer hann at hava so leingi, sum tað verður brúk fyri honum. Tað hevur verið tosað um, at eingilski David Jones, sum var álopsspælari í Fuglafirði seinna partin av sjeyti árunum, skal verða venjari.

Hann var við at vinna FM til Fuglafirðar í 1979. Men um tað so verður Abraham Løkin ella David Jones, sum fer at hava ábyrgdina, so vita teir báðir og spælararnir, at tað snýr seg um at arbeiða fyri, at ÍF skal sleppa undan at flyta niður úr bestu deildini, sum fuglfirðingar so fegnir vilja vera partur av.

Ítróttafelag Fuglafjarðar
Postrúm 94
FO-530 Fuglafjørður
www.if.fo

STOVNAÐ
25. mars 1946

FORMAÐUR
Jens Kjartan Feilberg

MEISTARAR (1)
1979

STEYPAVINNARAR
ongantíð

GREIPUVINNARAR
ongantíð

Í 1. DEILD (24 ár)
1971-82, 1985, 1988-89, 1993-94, 1996-99, 2004-06, 2008-

Í EUROPA
ongantíð

MÁLVERJAR — áður spælt við
Andras Gango
Rógvi Ryggshamar

VERJUSPÆLARAR
Áki Petersen
Jan Ellingsgaard
Jonn Thomsen
Bartal Eliasen — GÍ
Fritleif í Lambanum
Torstein Joensen
Knút V. Vesturtún — EB/S, HB
Uni R. Petersen

MIÐVØLLUR
Nenad Saric
Aleksander Jovevic — TB, NSÍ
Høgni Madsen — KÍ
Frank Poulsen
Debes Danielsen — Skála, NSÍ
Balazs Sinko
Dánjal á Lakjuni

ÁLOP
Dánjal Pauli Højgaard
Sasa Jovanovic
Atli Petersen

TILGONGD
Høgni Madsen
Debes Danielsen
Balazs Sinko

FRÁGONGD
Helgi L. Petersen — Fram

VENJARI
Abraham Løkin staðið fyri venjingunum í fyrireikingunum til kappingarárið